**Getsemane**
*Stangaskákið* 1
Mikudagin kl.20.00 er bønarmøti
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti, ung frá Soli Deo Gloria luttaka
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn
Sunnudagin kl.18.00 er møti v/ Høgna á Reynatrøð.
Barnamøti er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl.6:15 er morgunbøn

**KFUM & K Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími við Leivur í Buð, Ez. kap. 1
Kr.Himmalferðardag kl.17.30: Bønarløta, kl.18.00: Møti við Hanus Simonsen

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøld kl 20.00: Opið hús fyri ung. Hóskvøld kl 20.00: Ungdómsmøti. Sunnukvøldið kl 18.00: Møti v/ Thomas Juul Askham og Jóannes Dánielsen

**Betania,Skopun**
Mikukvøldið bønarmøti kl. 20
Fríggjakvøldið sangvenjing kl. 20

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 14,12-20.
Kristi himmalferðardag verður sangmøti í Sólarris í Húsavík kl. 18.00. Innsavnað verður til Rumeniahjálpina.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Ragnheiður Viderø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mikudagin kl 20.00: Heimaforbund
Hósdagin kl 18.00: Sang og vitnimøti.
Fríggjamorgun kl 9.30: Orðið á borðið
Sunnudagin kl 11.00: Morgunmøti/Sunnudagsskúli. Kl.18 evang møti.
Eisini minna vit á árasøluna sum verður leygardagin 31/7

**Betania í Porkeri**
Familjumøti verður Kristi himmalferðardag kl. 18.
Søga verður til børnini og boðskapur til tey vaksnu.
Solosangur við Onnu G. Djurhuus.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Møti verður í Missiónshúsinum í Porkeri sunnukvøldið 4. mai kl 18.
Michela Johansen og Helena Petersen av Tvøroyri tala.
Streingjakórið í Porkeri syngur.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Betaniakirkjan, Ålborg**
Leygarkvøldið 3. mai kl. 19.00 verður evangeliskur fundur í Betaniakirkjuni, Dag Hammerskjolds 2, Ålborg.
M.C. Restorff og aðrir syngja. Levi Joensen og aðrir tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Samkoman Malta*

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333

**Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag (KLH)**
Aðalfundurin hjá Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag, KLH, verður í Hoyvíkar kirkju Kristi himmalsferðardag 01. mai 2008 kl. 14.30.
KLH er ópolitiskt og hevur til endamál at virka fyri kristiligum sendingum í almenna Kringvarpinum og at styðja útvarpið og sjónvarpið í góðum og sømiligum sendingum. KLH vil forða fyri, at útvarpið og sjónvarpið verða nýtt til ósømiligar sendingar og annað, sum ikki er kristnum siði og kristnari trúgv verdugt.
Í sambandi við aðalfundin verður umrøða og orðaskirftið um hugburð og virðir í barna- og ungdómssendingunum í Kringvarpinum.
Tað ber til at tekna seg sum lim á aðalfundinum.
Í sambandi við aðalfundin, verður eisini alment møti í kirkju- og missiónshúsinum á Argjum kl. 19.00. Argjakórið syngur. Øll eru vælkomin.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491 Fax 316481*
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur:tilhald@ torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
Mikudagur 10.00 - 12.00 Bindiklubbur, Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Túrur: Randi/Elisabeth, fysioperapeutar. Sjá skránna í Tilhaldinum
Túrurin mikudagin: Vitja kinesisku listaframsýningina í Listaskálanum. Fótfólkið hittast í Tilhaldinum kl. 14.30
Hósdagur 10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
14.00 – 16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
Fríggjadagur, Kristi Himmalsferðardagur: Stongt
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur opið mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.

**Dagtilhaldið í Gøtubrá tlf 441662.**
Opið týsdag og hósdag kl. 15-18.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795.
Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
***Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00. Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 30. apríl. Vit fara til Havnar. Fyrst vitja vit í Tinghúsinum, síðani fara vit at bowla og eta døgurða, og vit enda í býnum, har møguleiki verður at gera ørindi. Tilmelding á tlf. 211921 í seinasta lagi týsdagin kl. 12.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Kunningarstovan, Felagið Tórshavn**
Vaglið 4, Postboks 379, 110 Tórshavn.
tlf. 302425
torsinfo@torshavn.foa
www.visittorshavn.fo
Opið er má-fr kl. 11-17, ley kl. 10-13.

**Sandoyar Kunningarstova**
*FO-210 Sandur*
*Tlf. 361836*
*www.visitsandoy.fo*

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvønn mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**70 ára føðingardagur**
Mikudagin 30. apríl verður Rasmus Glyvradal, Glyvrar, 70 ár. Dagurin verður hildin Kristi himmalferðardag 1. mai í Sjócaféini í Runavík frá kl 17.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 8. juni hava Sanna og Ivan Johannesen í Miðvági gullbrúdleyp. Leygardagin 3. mai verður dagurin hildin í heiminum. Øll eru vælkomin frá kl. 15.00

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 14. mai 2008 hava Dorit og Kjartan S. Jensen, Oyri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 17. mai kl. 18.30. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum verða biðin at siga frá í seinasta lagi 4. mai á tlf. 422283 ella 224605.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 14. mai hava Gunnvá og Bjarki Magnussen, Húsavík, silvurbrúdleyp. Veitslan verður hildin á Keldu í Skálavík leygardagin 17. mai kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 7. mai á tlf. 361371 ella 280371.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 2. mai kl. 16 giftast Bjørg Berg Jørgensen og Olivier Vallée í Marmorkirkjuni í Keypmannahavn. Brúdleypsveitsla verður fyri innbodnum í Føroyingahúsinum á Vesterbrogade.

**Brúdleyp**
Leygardagin 12. juli kl. 15.00 giftast í Uggerslev kirke, Karina Abelsen og Jan Eidesgaard, Eiði. Veitslan verður hildin í Uggerslev Forsamlingshus. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á seinasta lagi 16. mai á tlf. 004541622098 – 004564825820 ella via mail: janhoghamar@gmail.com

**Konfirmatión í Nólsoyar kirkju sunnudagin 4. mai**
Konfirmantar:
Sunnvá Andreassen
Rannvá Gudmundsdóttir Joensen
Jóhan Hansen

**Konfirmatiónir í Danmark**
Hósdagin 1. mai verður Sissal Borgarlíð konfirmerað í Vodskov kirkju. Adressan er: Store Tingbakke 212, 9310 Vodskov.

Sunnudagin 4. mai verður Eydna Guðrun Gudmundson fermd í Lunderskov kirke. Adressan er Jættehøj 5, Lunderskov.

Sunnudagin 4. mai kl. 10 verður Bjørg Tausen, dóttir Irenu & Jóannes Tausen, fermd í Fredens Kirkju í Herning. Bjørg býr á Valdemarsvej 275, DK-7400 Herning, Danmark.

Sunnudagin 4. mai verður Stefan í Dali Mir-Mackiewicz, H. P. Andersens allé 6, 6650 Brørup, Danmark, konfirmeraður í Johanneskirken í Brørup.

Mathias Guðjónsson, sonur Rakul og Ásmundur, Søgårdsvej 2, 3080 Tikøb, verður konfirmeraður í Gentofte kirkju í Gentofte hósdagin 1. mai kl. 10.00. Konfirmatiónin er fyri innboðin í Fortets Restaurants Selskabslokale.

